# Flogvøllurin verður útbygdur

- Landsstýrið heldur fast um ætlanina at yvirtaka, leingja, útbyggja og dagføra flogvøllin í Vágum, soleiðis sum eg havi gjørt semju við danska forsætisráðharran um.

Hetta sigur Jóannes Eidesgaard, løgmaður, í sambandi við nógva kjakið, sum verið hevur um flogvøllin í seinastuni.

Løgmaður ger greitt, at landsstýrið somuleiðis heldur fast við, at kann-ingarnar av, hvar ráðiligt er at gera annan flogvøll, halda fram, soleiðis at politisk støða kann takast til spurningin, hvar hann skal vera, sigur løgmaður.



# »De er skrupskøre…«

**Tað er skoðsmálið, sum Óli Breckmann, tingmaður Fólkafloksins gevur teimum, sum stríðast fyri rættindunum hjá samkyndum**



POLITIKKUR
*Heini S. Kristiansen*
*Heini@sosialurin.fo*

Í politiken í gjár var umfatandi samrøða við Óla Breckmann um §266b. Óli kom við nøkrum sera hvøssum úttalisum, sum vóru sligin stórt upp í blaðnum. Formaðurin í tingbólkinum hjá Fólkaflokkinum smæðist ikki við at taka til hvassar vendingar, tá ið hann skal lýsa málið um »kynsligan samleika« í samband við §266b. Her er eitt brot úr samrøðuni:

Den konservative politiker Óli Breckmann er en markant stemme i den færøske debat om homoseksuelles rettigheder. Han frygter, at den lovændring, Lagtinget snart skal stemme om, vil »pervertere en hel generation«.

*Hvorfor stemmer du nej til forslaget?*

»Fordi jeg er meget overbevist om, at hvis vi prøver på at øge retssikkerheden med millimeters retfærdigheds-skala, og vi bliver ved med at bygge flere og flere såkaldte mindretalsgrupper ind i en såkaldt beskyttelseslov, så bliver de et flertal på tidspunkt. Og jeg har mærkelig fornemmelse af, at de typer, der skal pådutte os deres idéer om menneskerettigheder, er de samme, som forsøgte at pådutte os nazismen og kommunismen«.

*Hvad er det præcis for nogle typer?*

»Ideologiske aktivister. Den nyere historie har masser af eksempler. Den mærkelige fredsbevægelse i Sydafrika. Og senere den politiske sekt, som kalder sig miljøaktivister. De er fuldstændig skrupskøre – alt det her med hul i luften, og nu smelter isen, og nu stiger vandene, og nu slipper olien op, og nu ryger alle råvarepriserne gennem loftet. Og nu er det altså blevet de homofile, som vi skal bankes om ørene med som det seneste sekteriske påfund. Alt det gør mig lidt skeptisk«.

*Hvorfor ville det være så slemt at give homoseksuelle samme rettigheder som andre?*

»Hvis man nu lavede en rundspørge på gaden og spurgte folk: 'Ville du gerne være født eller adopteret af en homoseksuel familie?' – hvor mange tror du så ville svare: 'Ja, det ville jeg da meget gerne'. Hvor mange mennesker vil med glæde i stemmen sige: 'Min mor hedder Peter, og min far hedder Søren' eller 'Min mor hedder Annegrethe, og min far hedder Malene'? Tror du, at det er mere end fem-ti procent?«.

*Rætting: Tvær av myndunum í greinini »Hygg hvussu stórar blómur mínar eru« vóru komnar skeivt fyri í vikuskiftisblaðnum herfyri. Soleiðis síggja tær út av røttum.*







STUTT SAGT

# Kring landið við 150-ára fríhandli



SØGA
*Tíðindaskriv*

Í samband við at 150 ár eru liðin síðani einahandilin varð avtikin, fer løgmaður saman við Landsskjalasavninum eina ferð kring landið við fyrilestrum og ymiskum forvitnisligum skjølum frá tí tíðini, einahandilin var. Týskvøldið verður farið til Vestmanna, hóskvøldið til Klaksvíkar og mánakvøldið komandi til Tvøroyrar. Tiltøkini eru løgd á hesum plássum, sum øll høvdu einahandil.

Fyrilestrarnir snúgva seg mest um søgulig árin á vinnu og samfelag, eftir at einahandilin varð avtikin.

Skráin fyri tiltøkini:
Vestmanna 21. november í Miðhøllini í Nýggjaskúla.
Kl. 19.00 Løgmaður
Kl. 19.05 Sámal Tróndur Finnson Johansen
Kl. 19.25 Erland Viberg Joensen
Kl. 19.45 Tónleikur

Klaksvík 23. november í Leikalund
Kl. 19.00 Løgmaður
Kl. 19.05 Sámal Tróndur Finnson Johansen
Kl. 19.25 Jógvan Ravnsfjall og Andras Sólstein
Kl. 19.45 Tónleikur

Tvøroyri 27. november í handlinum hjá T.F. Thomsen
Kl. 19.00 Løgmaður
Kl. 19.05 Sámal Tróndur Finnson Johansen
Kl. 19.25 Jóan Pauli Joensen
Kl. 19.45 Tónleikur

